# – Eri errin av, at so nógvar tjó



*Fólk eru fegin – og errin um heiðurin, sum virkið í Leirvík hevur fingið sum Ársins virki 2005*
Mynd: Jens Kr. Vang



*Høvdini, sum áður vórðu burturbeind, verða nú turkað og útflutt til Nigeriu, har tey verða brúkt til súpan*
Mynd: Jens Kr. Vang

**- Jú, nógv spurdu, um Høvdavirkið fór at vera kosið ársins virki í ár, men sjálvur haldi eg tað vera ótrúligt, at vit náddu hesum heiðuri longu í ár. Vit hava bert fýra ár á baki, samstundis sum vit hava onnur virki í Føroyum sum hava klárað seg væl, hóast tað kanska ikki gongur so væl hjá øllum beint nú, sigur Eirikur á Húsamørk**

ÁRSINS VIRKI

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Lagið var gott á Høvdavirkinum í Leirvík, tá ið Sosialurin vitjaði mánamorgunin, nú virkið á vinnudegnum seinasta fríggjadag varð kosið at vera Ársins virki 2005. Fólk vóru smílandi og fryntlig og tóktust errin av at eiga sín part av hesum heiðuri.

Slíkt fer ikki afturvið borðinum uttan, at okkurt verður gjørt burtur úr, og seinasta leygarkvøld skipaði Høvdavirkið fyri veitslu, har øll tey, sum arbeiða á virkinum og høvdu høvið at vera við, hugnaðu sær.




*Jóhan Páll Joensen, h.m., formaður í Føroya Arbeiðsgevarafelag, handar Eiriki á Húsamørk heiðursmerkið*
Mynd: Eirikur Lindenskov

Røður vórðu hildnar, og blómur vórðu handaðar.

### Málleysur

Eirikur á Húsamørk, stjóri á Høvdavirkinum, sigur, at hann gjørdist málleysur, tá ið arbeiðsfólkið handaði honum eina stóra blómusamling fyri heiðurin, sum nú er latin virkinum.

- Eg eri errin av at vera stjóri á einum virki og síggja, hvussu væl so nógvar tjóðir kunnu arbeiða so væl saman og náa so høgum málum, sum vit hava nátt.

Eirikur vísir á, at einsamallur hevði hann ongan